VB — Sóljan 27-22 (11-9):

# Bronsan hongur fyri framman

**Tað var ikki fyrr enn miðskeiðis í seinna hálvleiki, at vágbingar fóru frá vágakvinnum, sum royndu at bíta frá sær uttan at tað eydnaðist**

HONDBÓLTUR - KVINNUR
*Sveinur Tróndarson*

VB hevur framvegis møguleika at vinna bronsumerkini í ár. Tað er niðurstøðan eftir dystin móti Sóljuni í høllini í Vági sunnudagin. Gamaní merkir tað, at VB helst skal vinna dystirnar móti VÍF á útivølli og á Stjørnuni heima, men gera tær tað er bronsan vís.

Sjálvt tað vóru 12 stig millum liðini, sum hittust í høllini í Vági sunnudagin, gekk heldur enn ikki stirltið hjá VB at sleppa frá Sóljuni. Vágakvinnur hingu í so frægt sum tær kundu og tað eydnaðist teimum líka til miðskeiðis í seinna hálvleiki. Tá setti VB ferð á og innan fyri tveir minuttir miðskeiðis í hálvleikinum skapti VB eitt hol upp á fýra mál, og tað var nóg mikið til at tryggja dystin.

Dómaraseðilin frá dystinum vísir, at talan hevur verið um tvey heilt ymisk lið. Gamaní eru útlendskir leikarar á báðum liðum, men útlendingarnir hjá VB eru ikki so eygsýndir sum eitt nú Asta Petrauskiene er tað hjá Sóljuni. Einki er at ivast í, at útlendingarnir hjá VB hava stóran týdning, men har eru eisini aðrir leikarar, sum eisini tora at taka ábyrgd og sum duga at gera mál.

Fyri mótstøðuliðið ger hetta uppgávuna truplari av tí, at tey skulu verja fyri fleiri herum, og tað kann væl vera tað, sum hevur gjørt munin í Vági.

### Hópur av brotskøstum

Eitt sum sermerkir dystin í Vági sunnudagin, er talið av brotskøstum og útvísingum. Dómaraseðilin vísir, at Sóljan hevur fimm útvísingar meðan VB bara hevur eina, og tað er eisini eftir eina tvær útvísingar við stuttum millumbili, at VB leggur sjógv til Sóljuna. Útvísingarnar gera at tær sum eru eftir á vøllinum skulu stríðast nógv meira, og tað er eisini nakað sum kostar. Serliga tá liðið, sum Sóljan í hesum føri, er farið til Vágs bara við einum skiftileikara.

Eitt annað sum eisini sermerkir dystin í Vági er, at Sóljan ger 10 brotskøst. Hetta sampakkar rættiliga væl við talið av útvísingum og kann vera eitt tekin um, at leikararnir ikki eru nóg væl fyri kropsliga. Vit kunnu tó ikki við vissu siga, at so er, men ofta er samanhangur millum vánaliga kondition og nógvar útvísingar og nógv brotskøst.

Dysturin í Vági var tann næstseinasti hjá Sóljuni og hóast tær liggja aftast í løtuni, er ikki vist, at tær eisini liggja har tá seinasti dysturin er leiktur. Tann dysturin er nevniliga móti næstniðasta liðum og hann verður leiktur í høllini á Giljanesi næsta fríggjakvøld.

Eins og VB veit tað, kennir Sóljan eisini treytirnar fyri, hvussu tær tryggja sær enn eitt ár í bestu kvinnudeildini í hondbólti. Sigur á Kyndli er eitt avgjørt krav og tá tað er yvirstaðið skulu tær leggja sítt álit á VÍF, at tær vinna á Kyndli.

### Dysturin í tølum:

**VB — Sóljan 27-22 (11-9)**
Málskjúttar:
VB: Regina Radó 6 (2), Sólrun Krosslá 6 (2), Margreth Augustinussen 4 (1), Durita Rouch 4, Rannvá Augustinussen 3, Eyðbritt Krosslá 3 og Gabriella Fekete 1 (1)
Sóljan: Asta Petrauskiene 9 (1), Sólja Jóanisdóttir 6, Fía Selma Nielsen 2, Hertha Simonsen 2, Heidi Maria Akselsen 2 og Heidi Haraldsen 1
Brotskøst: VB 10, Sóljan 2
Útvísingar: VB 1, Sóljan 5
Dómarar úr TB: Birgir Dimon og Vilhelm Meyer



*Enn hava Regina Radó og hinar úr VB møguleikan fyri bronsuni, men vónin er nú kortini um at kámast*

StÍF-VÍF 23-27 (11-14):

# Enn ein sigur til VÍF

**VÍF kvinnur gjørdu sína skyldu í dystinum móti StÍF í høllini á Skála sunnudagin, men tað var ikki tí, at tær spældu seg út**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Sveinur Tróndarson*

Vestmannakvinnur hava nú vunnið 22 landskappingardystir í hesum kappingarárinum av 22 møguligum. Tveir dystir eru eftir og sum tað sær út í løtuni, er eingin, sum stendur teimum kurl og tí fara tær helst gjøgnum hetta kappingarári púra ósigraðar. Einasti ivin verður helst í dystinum móti VB, sum hevur bronsumerkini at stríðast fyri. VB kann nevniliga við sigri á VÍF í Vestmanna og á Stjørnuni heima tryggja sær bronsumerkini, so tær hava nakað at stríðast fyri.

### Uppiborin sigur

Sigurin hjá vestmenningum á StÍF sunnudagin var fult uppiborin. Tað er ikki oftari enn so, at bæði liðini eru nøgd tá dysturin er liðugur, men hetta var fatanin á Skála sunnudagin. Vestmannakvinnur vóru nøgdar við sigurin, sjálvt um hann kundi verið størri, og strandingar vóru nøgdar við, at tær ikki taptu meira enn tær gjørdu.

Tað var VÍF, sum setti dagsskránna frá byrjan, og áðrenn strandingar høvdu vent sær, vóru tær aftan fyri við fýra málum, sum stórt sæð helt sær gjøgnum dystin.

Einu løtuna í seinna hálvleiki fekk VÍF eina sjey máls leiðslu, men fimm minuttir seinni høvdu strandingar minkað munin niður í aftur fýra mál. Hesin munur helt sær til dystarenda og tað sá út sum øll vóru glað ...

### Manuela um útileikari

Størsta hendingin á Skála var helst, at vanligi málverjin hjá vestmenningum, rumenska Manuela Stan, hevði fingið nýggjan leiklut. Hallfríð Isaksen hevði tikið yvir í málinum og tí var Manuela at síggja sum útileikari.

Vit skilja, at sjálvt um tað ikki hendir so ofta, so er tað komið fyri fyrr, at Manuela hevur verið útileikari, og tí kom hon bara væl frá. Hon kom ikki á málskjúttaralistan, men tað var bara tí, at hon brendi brotskastið sum hon tók.

VÍF-kvinnurnar fingu tó staðfest, at tær eru klárt besta liðið í deildini, tí sjálvt um tær ikki vístu alt tað tær duga, vístu tær kortini, at tær eru truplar at steðga tá spælið koyrir. Tær eru sterkar og vita væl, hvar tær hava hvørja aðra og tað kann vera trupult hjá hinum liðunum at byrgja upp fyri.



*VÍF vann sunnudagin sín 22. sigur á rað, og hóast tað til tíðir var tungt, so var eingin ivi um úrslitið, tá saman um kom*

### Byrjanin var ov tung

Sum sagt vóru báðir partar nøgdir við úrslitið av dystinum. VÍF tí enn ein sigur kom til høldar og tað er stórt sæð tað einasta tær hava at spæla fyri, nú meistaraheitið er vunnið og steypakappingin við. Tær kunnu eksperimentera eitt sindur og tað gjørdu tær millum annað í dag.

Hjá strandingum hevur tað har aftur í móti týdning at fáa víst, at liðið ikki er so vánaligt, sum grundspælið bar boð um. Tá vann liðið bara ein dyst og tey flestu mundu helst væntað, at uppflytararnir skuldu fara beina leið niður aftur í aðru deild.

Men tað var ein orsøk til úrslitaligu oyðimarkargongdina, tí Alina Olaru, sum í dag gjørdi níggju mál, var skadd ein stóran part av grundspælinum og hon er ein spælari sum saknur er í, tá hon ikki er tøk.

Í seinnu hálvu hava allar verið tøkar og nú hevur spælið eisini hingið meira saman. Liðið hevur vunnið fýra dystir av tíggju og hevur tryggjað sær enn eitt ár í bestu deildini og tað er í fyrsta umfari nóg mikið. Næsta ár kann málið so setast hægri.

### Dysturin í tølum

**StÍF — VÍF 23-27 (11-14)**
Málskjúttar:
StÍF: Alina Olaru 9, Anna B. Danielsen 6, Sunfríð B. Jacobsen 4 (2), Anna Maria Berthelsen 2 og Ileana Manolescu 2
VÍF: Joana Rapa 8 (1), Sóley Mikkelsen 8 (4), Nicoleta Radu 4, Fríða Marjunardóttir 3, Alis Høghamar 3 og Randi Kúrberg 1
Brotskøst: StÍF 2, VÍF 7
Útvísingar: StÍF 1, VÍF 1
Dómarar úr Neistanum /Kyndli: Kristian Johansen og Eyðun Samuelsen



Neistin-Stjørnan 29-19 (10-9):

# Avgjørdu silvurdystin

**Við sigrinum á Stjørnuni mest sum tryggjaði Neistin sær silvurmerkini, og tað man fyri elsta hondbóltsfelagið í landinum kennast sum ein stórur sigur**

HONDBÓLTUR - KVINNUR
*Jákup Mørk*

Eftir at Stjørnan úr Klaksvík upprunaliga tóktist vera einasti avbjóðarin hjá einaráðandi VÍF, eru klaksvíksgenturnar nú í teirri støðu, at tær ikki longu kunnu gera av, hvørt tær skulu fáa silvurmerkini.

Neistin setti nevnliga eitt fyribils flott punktum fyri einari røð av sigrum, sum hevur tikið hevur tikið tær somikið langt framum bæði VB og Stjørnuna, at tær nú mest sum hava tryggjað sær silvurmerkini.

### Ferð á í seinna

Sunnudagin var dysturin, sum framman undan varð mettur sum hann, sum skuldi avgera silvurstríðið. Undan hesum hevði Neistin við einum dysti meira vunnið seg eitt stig fram um Stjørnuna, og við bert einum dysti afturat kundi Neistin tí spæla sær allar trumfirnar í hondina.

Hjá Stjørnuni var støðan meinlík henni hjá Neistanum. Við einum sigri fór liðið aftur upp á silvurplássið, og tá høvdu ráð eisini verið til at tapt dystin í Vági, sum enn liggur á láni.

Fyrra hálvleik av dystinum var gongdin eisini soleiðis, sum ein kundi vænta millum tvey somikið jøvn lið. Hvørgin parturin tordi veruliga at satsa alt, og líkt var til, at nervar spældu ein týdningarmklan leiklut í øllum hesum.

Munur kom tó í alt fyri eitt, tá farið varð undir seinna hálvleik. Neistin fekk fýra tey fyrstu málini, og tað var eisini líkt til, at hetta gav teimum meira frið yvir spælinum. Nú vóru tað tær, sum settu ferðina á dystinum, og uttan at overva seg, hildu tær gestunum í einum jarntaki. Eitt lítið skifti sá kanska út til, at Stjørnan fekk svarað aftur, men tá Neistin so aftur fekk trý mál á rað, var alt mest sum avgjørt.



*Stjørnan fall, tá tær vitjaðu í Havn sunnudagin, og nú hevur Neistin øll silvurkortini á hondini*

### Stórur sigur

Sum sagt, so hevði sigurin við sær, at Neistin nú nærum eru vísar í at vinna silvurmerkini. Í øllum førum, um tær megna uppgávuna, sum eitur StÍF á útivølli í seinasta dystinum. Ein uppgáva, sum tó er væl truplari, enn stigatalvan sigur, tí eftir at tær í grundspælinum ikki fingu nakað serligt burturúr, er StÍF kanska tað liðið, sum hevur ment seg mest í endaspælinum.

Uttan útlendingar av nøkrum slag vóru neistakvinnurnar annars mettar sum eitt slag av outsidara til stríðið um heiðursmerki, tá kappingarárið byrjaði. Her tóktust bæði Stjørnan og VB – umframt VÍF – at vera munandi betri fyri. Men stríðsviljin á liðnum hevur ongan tíð fornoktað seg, og so líðandi hava tær blandað seg alt meira upp í silvurstríðið, og nú er so líkt til, at hetta hevur givið úrslit.

Fyri Stjørnuna mundi tapið hinvegin vera eitt stórt vónbrot, men tað skerst ikki burtur, at liðið ikki hevur havt neyðugu breiddina í hópinum í ár. Tískil hava skaðar hjá stuðulsleikarum rakt sera meint. Skuldi tað borið soleiðis á, at Neistin tapir seinasta dystin, so hevur Stjørnan tó enn møguleikan fyri silvurinum, men til hetta krevst, at tær vinna á útivølli móti VB, og tað er so heldur ikki nakað, sum kann sigast fyri vist.

### Dysturin í tølum

**Neistin-Stjørnan 29-29 (10-9)**
Málskjúttar:
Neistin: Gunnleyg Berg 8(5), Mildrið Jacobsen 7, Súna Mørk 5, Katrin á Neystabø 5(2), Birita Wardum 3(1), Ata Høgnadóttir 1
Stjørnan: Andrijana Milodanovic 5(2), Joan M. Joensen 4(1), Simona Dziugyte 3, Una Olsen 3, Anna Kristina Samson 2, Bára Skaale 1
Brotskøst: Neistin 9, Stjørnan 5
Útvísingar: Neistin 3, Stjørnan 2
Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum.

Neistin-KÍF 34-27 (11-15):

# Við bit og slit

**Leingi var líkt til, at kollfirðingar skuldu vinna ein sera óvæntaðan sigur á Neistanum, men tá tað sá svartast út reistist havnarliðið, meðan alt fall frá hvørjum øðrum gestunum**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Á pappírinum líktist tað einum avgreiðsluspurningi, tá Neistin sunnudagin skuldi taka ímóti KÍF. Kollfirðingar hava í endaspælinum verið millum lakastu liðini, meðan Neistin hinvegin eftir eina trilvandi byrjan hevur verið sera væl koyrandi í seinastuni, og varð hetta ikki minst prógvað, tá teir í Vestmanna sigraðu á oddaliðnum, VÍF.

### Sensatiónin ávegis

Tað var tó lítið, sum sást til hendan munin, tá liðini fóru undir dystin. Kollfirðingar spílaðu seg kanska ikki so øgiligt út, men teir fingu tó hampuligt glið á sítt spæl. Hinvegin góvu neistamenninir lítið og einki dømi uppá, at hetta skuldi verið annað av liðunum, sum í vetur hevur barst um gullmerkini.

Spakuliga tók KÍF eisini at draga frá, og tó at Neistavenjarin royndi at rópa sínar menn ígongd við at nýta eitt time-out, so munaði einki. Tað vóru kollfirðingar, sum vóru teir stinnaru, og tá teir við eini fýra mála leiðslu fóru til hálvleiks, var framvegis ikki líkt til, at heimaliðið skuldi venda gongdini.

### Trygt hóast alt

Møguliga vóru tað útvarpstíðindini um, at strandingar vóru á odda móti VÍF, sum gjørdu sítt, men í øllum førum var annað lag á Neistanum, tá farið varð undir fyrra hálvleik. Alt fyri eitt fóru teir at eta burtur av leiðsluni hjá KÍF, men so við eitt tóktist alt hetta at vera til fánýtis.

Munurin var minkaður niður í tvey mál, tá neistamenn brádliga vórðu álvarsliga skerdir. Fyrst fingu tveir mans tveir minuttir í part, og tá Hans Áki so púrasta óneyðugt fekk reyða kortið, skuldi Neistin brádliga spæla tríggir móti seks í tveir minuttir.

Kollfirðingar megnaðu tó ikki at taka hendan møguleikan. Úrslitið av yvirtalsstøðuni gjørdist 2-2, og so fór Neistin annars ígongd. Við Jacobi Jónsson - sum ikki einaferð - á odda settu teir ferð á. Ein fyri og annar eftir fuku bóltarnir inn um Óla Christan Djurhuus í málinum, og so við og við broyttist myndin, til at enda stóð klárt, at Neistin hóast alt skuldi vinna ein hampuliga trivaligan sigur. Seinastu 20 minuttirnar av dystinum skutu kollfirðingar bert 7 mál, meðan Neistin í sama tíðarbili fekk ikki færri enn 16 mál, og hetta sigur kanska eisini nakað um, hvussu orkan at spæla var hjá báðum liðunum. Kollfirðingar settu snøgt sagt ikki ein fót rættan hesa seinastu løtuna, og við eitt sindur meira av nærlagni kundi væl verið, at Neistin vann ein enn tryggari sigur.



*Tað eydnaðist aftur hjá Neistanum, men enn eina ferð var tað meira enn tungt at fáa sigurin móti einum av botnliðunum til høldar*

### Hanga í

Úrslitið av dystinum viðførdi – saman við StÍF sigrinum á VÍF – at Neistin enn heldur fast í møguleikanum fyri at vinna FM. Tað er kanska ikki væntandi, at VÍF fer at missa móti antin H71 ella Kyndli, meðan Neistin eisini sítt at hugsa um, tá teir í seinasta umfarinum fara inn á Skála. Men tó. Sum støðan er nú, so er hon ikki sørt meinlík teirri, tá Kyndil bert skuldi vinna ein dyst av teimum seinastu trimum, men kortini misti alt á gólvi. Kanska er hetta bara ein illusión hjá neistanum, men ein slík kann altíð vera hent at krógva seg aftan fyri, inn til kaldi veruleikin ger seg galdandi.

### Dysturin í tølum

**Neistin-KÍF 34-27 (11-15)**
Málskjúttar:
Neistin: Heini Joensen 13(5), Jacob Jónsson 11(1), John Petersen 7, Ragnar Stakksund 1, Ræni Slættanes 1, Karl Oddmar Rasmussen 1
KÍF: Petur Martin Poulsen 5, Eddie Joensen 4, Kristian Madsen 4, Iljan Topic 4, Regin Petersen 3, Durica Tomic 3(2), Jákup Dam 2, Hallur Hansen 2
Brotskøst: Neistin 7, KÍF 2
Útvísingar: Neistin 4, KÍF 8
Diskvalifikatión: Neistin 1(Beinleiðis reytt)
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum